# Kreativ vika á Stíggi

**Í seinastu viku var verkstaðurin, Stíggjur í Saltangará, karmur um eina kreativa viku. Hetta var ein partur av útbúgvingini hjá trimum næmingum á pedagogskúlanum**

SKÚLI OG UPPGÁVA
*Orð: Rúna Sivertsen*
*Myndir: Ian D. Jacobsen*

Tað vóru tær tríggjar, Helena Danielsen, Vivi Jacobsen og Jóhanna Petersen, sum stóðu fyri kreativu vikuni. Tær ganga allar tríggjar á pedagogskúlanum í Havn á øðrum ári.

Fyrst vóru bæði brúkarar og starvsfólk býtt upp í tríggjar bólkar. Vivi stóð fyri ninoleumsprenti, Jóhanna fyri akrylmáling og Helena fyri veving.

Til vevingina varð nýtt hosnahegn, sum varð spent upp á rammu. Síðani vóru restir av toyi, lyngur, bark og gággur stungið inn í millum hegnið.

Alt tað, sum gjørt varð, sá út sum rættilig listaverk, tá liðugt var.

Poulina Johannesen, leiðari, sigur, at tey eru fegin um vikuna. Øll, bæði brúkarar og starvsfólk, fingu sera nógv burtur úr.

19 menningartarnaði koma til arbeiðis á Stíggi hvønn dag. Starvsfólkini eru 6 í tali.


Aftara rað frá vinstru: Vilhelm, Sólrun, Helena. Fremra rað frá vinstru: Herbert, Lena, Nicala og Magni


Standandi frá vinstru: Richard Wenzel, Julius, Kristjan, Mortan, Herbert, Jacob, Vilhelm, Hans Pauli og Sigvald. Sitandi frá vinstru: Berit, Joan, Nicala, Lena, Ann, Sólrun og Magni. Annfinn, Asjørn og Ásla vanta á myndini


Frá vinstru: Richard Wenzel, Vivi, Joan, Kristjan, Sigvald, Mortan og Berit


Aftara rað frá vinstru. Hans Pauli, Julius og Asbjørn. Sitandi frá vinstru: Jacob, Ann og Jóhanna



# Viljin til samstarv


Diana í Puntabyrgi og Jóna Olsen vóru millum fyrireikararnar á skeiðnum á Hotel Vágum seinasta vikuskifti. Á aðalfundi hjá Javna komandi vikuskifti leggur Diana í Puntabyrgi frá sær sum formaður eftir eitt rættiliga drúgt og virkið tíðarskeið í Javna

**Neyðugt er at vilja, tá ein hevur við fólk at gera. At vilja samstarv heldur Javni, at foreldur at fólki við menningartarni og fólk, sum arbeiða á stovnum, har fólk við menningartarni búgva og arbeiða, eiga at gera**

SAMSTARV
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Tað er neyðugt, at starvsfólk á bústovnum og arbeiðsplássum, har fólk við menningararni eru, og foreldur at búfólkunum eru á einum máli um tað, sum hendir og henda skal. Og ikki minst skilja hvønn annan.

Til at menna samstarvið millum stovanar og foreldur at fólki við menningartarni, hevði felagið Javni skeið á Hotel Vágum seinasta vikuskifti. Skeiðið varð hildið undir heitinum »Viljin at vilja«.

Tað, sum Javni vildi, at fólk skuldu vilja, var at kunna samskifta og samstarva um tað, tey fólkini, sum búgva á stovni og arbeiða á eitt nú vardum verkstøðum, hava fyri neyðini.

– Tað er ofta so, at foreldrini hava ilt við at sleppa børnunum, hóast tey eru vorðin vaksin, og flutt aðrastaðni at búgva. Foreldrini halda mangan, at tey vita best og duga best at skilja hesi fólkini. Men viðhvørt vísir tað seg kortini, at tað kann vera, at hesi vælmeinandi foreldur uttan at hugsa meira um tað, taka meira fyrilit fyri egnum hugsanum og ynskjum enn teimum hjá børnunum, sum nú eru vaksin og flutt heimanífrá, greiðir Jóna Olsen, leiðari á varda verkstaðnum á Brekku í Klaksvík, frá. Hon var ein teirra, sum stóð fyri skeiðinum á Hotel Vágum.

Jóna Olsen sigur, at tey hava hildið tað verið til fyrimuns fyri bæði stovnar og heim at halda eitt skeið, har fólk fáa høvi at hittast og tosa um, hvat slíkt samstarv er, og hvussu neyðugt tað er. At gera fólk tilvitað um, hvussu neyðugt hetta samstarvið er fyri tann einstaka.

Hon sigur, at hóast okkurt hendinga dømi er um, at fólk hava ymsar meininar um, hvat er best og ikki, eru tey í høvuðsheitinum samd um mestsum øll viðurskifti, og samstarvið er rættiliga gott.

Fólk meina tað væl, tá tey soleiðis meira ella minni ótilvitað hava lyndi at stýra livinum hjá børnunum. Men tey hava ongan rætt til tað, vísir Jóna Olsen á.

Tað fingu skeiðsluttakararnir millum annað staðfest í fyrilestri, sum Hans Trygvi Teirin, løgfrøðingur, helt á skeiðnum, har hann vísti á juridisku rættindini hjá fólki við menningartarni. Tey eru sjálvandi júst tey somu sum hjá øllum øðrum myndugum fólkum.

Jóna Olsen sigur, at Føroyar mangla lógarverk á økinum. Javni fer tí at heita á Trivnaðarmálaráðið um at gera reglugerðir fyri góðsku og eftirlitið við stovnum og arbeiðsplássum, sum fólk við menningartarni eru knýtt at.

# Sjógangarin ristir sín ramliga bógv

**Úr øllum landinum eru bátar av øllum sløgnum boðnir til Vestmanna á bátastevnu. Hetta er onnur stevnan av sínum slag**

BÁTASTEVNA
*Edvard Joensen*

Vestmanningar bjóða til bátastevnu tann 24. mei. Ætlandi skal stevnan líkjast teirri stevnuni, hildin varð í Vestmanna í fjør, siga fyrireikararnir.

Bátastevna er, sum navnið sigur, so nógv verður sjálvandi gjørt fyri, tey, sum sjóvegis koma til Vestmanna hendan leygardag í mei. Men hini, ið ætla sær at síggja ymisk av tiltøkunum, sum verða hildin í samband við stevnuna, sleppa eisini upp í part at


Vesmenningar bjóða annað árið á rað til bátastevnu í Vestmanna. Í ár verður hon hildin leygardagin 24. mei

hugna sær saman við siglarunum.

Eitt nú verður skipað fyri stórum dansitiltaki í ítróttarhøllini í Vestmanna hetta kvøldið, har kendi Country Bólkurin úr Klaksvík fer at spæla, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi, sum sent er út um dagarnar.

Tað krevur annað enn bara undirhald at skipa fyri eini slíkari stevnu, og øll hesi fólkini, sum luttaka, skulu eisini hava at eta.

Tað verður gjørt á Føroya Fiskavirking, har skipað verður fyri stórari kantinu. Fyrireikararnir siga, at í ár eru tey betri útgjørd enn seinast, tá neyðugt varð at heitt á luttakarar úr Vestmanna um at halda seg aftur, so gestirnir líkasum fingu sítt. Í ár skal eingin avmarking vera í so máta, siga tey.

Sum rímiligt er liggur eisini annað enn bara hugni aftan fyri eitt slíkt tiltak. Tað er Vestmanna Ítróttarfelag, VÍF, sum skipar fyri, og vónin er at fáa nakrar krónur at loypa av, tá avtornar.

Ætlanin er at brúka tann peningin til nýggja kapproðrarneystið hjá felagnum, eins og rakstur og smíð av nýggjum kapproðrarbáti eisini skal fáa part, siga tey í Vestmanna.

VÍF letur eina nýggja Havfrúgv smíða. Havfrúgvin plagdi at vera fýramannafarið hjá vestmenningum og man eisini fara at vera tað hesaferð, hóast einki stendur um tað í tíðindaskrivinum.

Tað er Olaf Haldansen í Vestmanna, sum er farin undir at smíða bátin, og væntandi verður hann liðugur til kapproðrarárið 2003, sum alment byrjar á Norðoyðarstevnu.

Fyrireikararnir siga, at Bátastevnan skal gerast eitt árliga afturvendandi tiltak í Vestmanna.